# Menna fiskivinnusamvinnu við Skotland

**Løgmaður metir seg hava havt sera fruktagóðar samrøður við skotska fiskimálaráðharran. Hann heitti á hann um at ávirka ES til at loyva føroyingum at hækka útflutningskvotuna á alifóðuri til ES úr 10.000 t uppí 50.000 t. Skotskir alarar ynskja at keypa meira alifóður úr Føroyum**

VIÐ LØGMANNI Í SKOTLANDI



*Jan Müller*

Hóast Anfinn Kallsberg, løgmaður ikki slapp at vitja øll plássini, sum vóru sett á skránna fyri vitjan hansara í Skotlandi, orsakað av tí ringasta kavaveðrinum í nærum mannaminni, so metir løgmaður kortini, at hann fekk nógv burtur úr, og tað er kanska heldur ikki so løgið. Sum fyrrverandi fiskimálaráðharri kendi hann seg rættiliga á »heimabana«, tá hann fyrst í vikuni hitti umboð fyri skotskar fiskivinnumyndugleikar.

– Vit høvdu ein sera góðan fund við kvinnuliga skotska fiskimálaráðharran, har tosað var um viðurskifti av felags áhuga. Her varð m.a. spurningurin um felags fiskastovnar, sild, makrel og svartkjaft umrøddur. Síðani varð spurningurin tikin upp um tað gráa økið í føroyskari oljusonu, har vit hava felags fiskivinnuumsiting. Tað er serliga við atliti til skip úr triðja londum og serliga norsk skip um, hvørjar reglur skulu vera galdandi, tá tey hava fiskiloyvi frá antin føroyskum ella bretskum ella báðum myndugleikum. Løgmaður sigur, at í teimum førum, har skip hava loyvi frá báðum londum at fiska í hesum øki, so kann væl vera talan um ein trupulleika. Men man er tó samdur um at fylgja teimum strangastu reglunum. Er meskavíddin ójøvn hjá báðum pørtum, so er tað tann mest stranga lóggávan, sum er galdandi.

Men hetta prátið gekk serliga uppá útblaking av fiski, sum er ein trupulleiki í hesum økinum. Sambært ES-reglum hevur man ikki loyvi til at hava fisk umborð, sum ikki lýkur treytunum fyri at hava loyvi at fiska. Sambært tí føroysku lóggávuni ikki hevur man loyvi at blaka nakað út. Sostatt er grundleggjandi munur á hesum, og verður tað roynt at finna eina loysn. Tað eru so samráðingar millum báðar partar, hvussu tað skal skipast.



### Alifóður

Løgmaður og skotski fiskimálaráðharrin komu so eisini inn á spurningin um alifóður.

Skotskir alarar hava ynskt at keypa meira fóður úr Føroyum, og Havsbrún hevur ynskt at útflyta meira enn tað, sum er loyvt sambært kvotuni í ES-sáttmálanum. Tað er eitt av teimum fáu viðurskiftunum, har vit hava eina avmarking uppá 10.000 tons.

–Vit hava ynskt at hækka hesa kvotuna úr 10.000 tonsum upp í 50.000 tons, og tað hevur verið tikið upp í felagsnevndini, men er enn ikki komið á mál har. Vit ynsktu so, at man frá skotskari síðu tók hetta málið upp, tí teir vórðu eisini sera áhugaðir í, at alivinnan í Skotlandi fekk møguleika at handla við Føroyar.

Løgmaður sigur, at skotar tóku upp spurningin um regulering á Rockall leiðini, sum nú er altjóða sjógvur. Har hevur ein serligur fiskiskapur tikið seg upp og tí er ynskiligt at fáa hann reguleraðan í altjóða samarbeiði.

– Skotar spurdu, um vit ikki vildu vera medvirkandi til tað, og søgdu vit, at tað málið vildu vit bera víðari til Fiskimálastðrið í Føroyum, soleiðis at teir kunnu taka tað upp har.

Annars varð samarbeiði á øllum havøkinum millum londini viðgjørt á fundinum í Edinburgh.

– Vit hava jú eitt havøki, sum hevur felags mark. Báðir partar ynskja at fáa eitt tættari samstarv og kunnleika hvør til annan. Skotski fiskivinnumálaráðharrin kemur so til Føroya í summar í sambandi við eina fiskivinnuráðstevnu, sum verður í juni. Tá fær hon so møguleika til at koma á tal við føroyskar fiskivinnumyndugleikar.

# Góð hugskot við heim um menning av útjaðara

VIÐ LØGMANNI Í SKOTLANDI

*Jan Müller*



Undir vitjanini í Skotlandi nýtti løgmaður eisini høvi til at hitta umboð fyri ein embætisbólk, sum hevur arbeitt við menning av útjaðaranum í Skotlandi, sum løgmaður sigur var ógvuliga líkur okkara útjaðarapolitikki. Hesin bólkurin hevur gjørt eitt umfatandi arbeiði fyri at lýsa hesar trupulleikar, sum vóru rættiliga nógv samanfallandi við teir í Føroyum. Anfinn Kallsberg sigur, at nú hann eisini sjálvur hevur tikið hetta málið upp í Føroyum, so tók hann stig til á fundinum við skotska arbeiðsbólkin, at víðari arbeiði, sum verður gjørt á tí økinum í Føroyum, eisini kann taka við onkrum av teimum hugskotum tey í Skotlandi eru komin við.

Í hesum sambandi hevur løgmaður við sær til Føroya allar tær drúgvu frágreiðingarnar, sum gjørdar eru í Skotlandi um menning av útjaðaranum.

# Samskifti millum løgting og skotska parlamentið

Tað eydnaðist ikki løgmanni og fylgi at vitja skotska parlamentið á hesum sinnik orsakað av tí ringa kavaveðrinum. Men kortini fekk løgmaður eina drúgva frágreiðing um, hvussu skotska parlamentið er skipað, hvørji øki teir hava ræði á o.a. Anfinn Kallsberg sigur, at hann fekk tí greiðu fatan, at mong av viðurskiftunum har eru eins og okkara egnu. – Eisini har hava vit tí fingið ávísar kontaktir, soleiðis at vit kunnu samskifta um royndirnar hjá hvørjum øðrum. Í hesum sambandi hitti løgmaður fleiri framstandandi umboð fyri parlamentið. Men ruðulleikin, ið stóðst av tí nógva kavnum, gjørdi tó, at onkur av tiltøkunum vórðu avlýst, eitt nú vitjan á Edinburgh Castle.



# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 2. mars til hósdagin 8. mars

## 2.000.000 krónur at vinna




*Hósdgain fer danska sjónvarpsrásin, TV3, undir nýggja sending, har møguleiki er hjá luttakarunum at vinna ikki minnni enn 2.000.000 kr.*

*Thomas Mygind, sum vit jú eisini kenna úr øðrum sendingum hjá TV3, er nú at síggja í stívasta pussi, meðan hann skal stýra teimum mongu, sum vilja vinna stóru peningahupphæddina.*

*Peningurin kemur tó sjálvsagt ikki rullandi av sær sjálvum, tí fyri at vinna, er neyðugt hjá luttakarunum at svíkja onnur, sum á tann hátt koma at standa eftir við ongum.*

*Sendingin, ið ber heitið »GRISK – når det gælder«, er fyrstu ferð á skránni hóskvøldið kl. 19.00.*

## Dagur í viku

*Dagfinn Olsen ummæli:*



Sat júst og hugdi at danskari sending – á útlendskari rás – um ummælarar. Semja var um, at innihaldið skal ummælast, ikki tøkniligar fortreytir og frambrot. Fjøldin av teimum, ið lesur eina lýsing av tøkniligum smálutum, er helst ikki stór.

Men hví havi eg trýst á útlendska rás? Hvussi er við innihaldinum á føroysku sjónvarpsrásini? Samband ella loysing? Fullveldi, fólkaatkvøða, eingin atkvøða, eingin løgmaður, nýggj Norrøna, milliónir til upplýsing áðrenn atkvøðu, Uttanlandsnevndin á ferð í USA, løgmaður í Bretlandi.

Hetta er nakað av tí, ið hevur sett dám á tíðindarenslið síðstu tíðina. Tað gongur strúkandi í Føroyum –ørskapurin er størri enn nakrantíð, vit svimja í pengum, og tykjast ikki hugsa ella minnast 8 ár aftur í tíðina.

Men hesin peningastreymurin hevur ikki sett dám á lønarlagið í Føroyum – sambært Starvsmannafelagnum, nú beint undan sáttmálasamráðingum.

Og staðfestast kann, at á so mongum økjum er gongulagið ikki merkt av pengatungum lummum. T.d. í Svf.

Tað er so sjáldan, at nakað er at seta seg í stólin til. Tey, ið hava parabol, hava sæð sendingarnar frá DR2 áður. Tey hava eisini betri tilboð í at velja á øðrum sjónvarpsræsum.

Tosað hevur leingi verið um, at myndugleikarnir mugu taka støðu, hvørt vit skulu hava eitt munagott Sjónvarp Føroya, ella sum nú, okkurt ið minnir tíðina, tá fjepparar í sjónvarpsfeløgum syrgdu fyri, at lítið kræsna fjøldin fekk okkurt at sovna av.

Men fjøldin er kræsin nú. Og tað hevur Svf ikki ráð til. Tað er dagur í viku, tá ein góð føroysk sending er á skránni. Í løtuni er skráin merkt av endursendingum. Tað er einki forgjørt í tí. Men bert endursendingar – tað bítur seg sjálvan í halan!

So tíðin er komin at taka støðu, tí góðar kreftir eru í Svf. Tær skulu bert hava møguleikar at arbeiða. Og tað kostar. Men tað mugu myndugleikarnir taka støðu til.

Hóast trongu karmarnar, so eru glottar. Prix-sendingarnar rigga, fyri at nevna eitt dømi.

Tað kann tykjast býttisligt, soleiðis bert at finnast at. Kritikkur kann jú eisini vera positivur. Men, álvaratos, í hesum rembingartíðum, so átti ein hin fremsti mentanarmiðilin at fingið umstøður. Í løtuni er hetta ein endurspegling av donskum sjónvarpi. Danskar sendingar í úrvali!! Hvat við at nýtt hasar milliónirnar, sum skuldu til ja ella nei upplýsing, til Svf?!

Nú slapp ÚF undan. Har er tó góðska í flestu sendingunum. Armgarð Arge hevur áhugaverdar sendingar, temasendingarnar, haldi tað er Føroyar í Dag, havi verið sera góðar og væl lagdar tilrættis. Og tey í Klaksvík eru ófølr, nýggja sms-kappingin í Sputnik er sera skemtilig.

Heiðurin hesa vikuna eigur tó útvarpslesarin, hin tit vita – Høgni – sum týsdagin mælti, at møguliga fekk løgmaður karantenu, nú hann kemur aftur úr Bretlandi! Veit, at summi fáa ilt fyri hjartað av viðmerkingum hansara, men tað eru løtur, har tær veruliga sita!!

## Hendurnar upp

*- á vitjan í Føroyum*




## Temasending um Føroyar

*– samsending við DR2*




## Apollo 13




## Skadestuen

